Framhald av forsíðuni

Hann fekk nógv fólk heft uppí projektið í sambandi við fíggingina av projektinum.

BERT ROKNINGIN LÁ EFTIR

Lakeringshøllin varð ongantíð av nøkrum, men stóri bygningurin stendur uppi, tómur og uttan nakað virksemi.

Tá roknskapurin fyri projektið var gjørdur upp manglaðu 17 miljónir. Fúti og skattamyndugleikar sóknast eftir Rolf Jonsson, og kemur hann til Svøríkis, verður hann straks tikin, sigur kelda okkara í Svøríki, tí í kjalarvørinum á projekti hansara er ein rød av konkursum: eitt partafelag fyri og annað eftir er vorðið drenað fyri pengar, sum eru fluttir yvir í eitt nýtt, áðrenn áognararnir hava fingið tað teir áttu til góðar.

HVUSSU VIÐ VÁGBINGUM?

Hvussu Rolf Jonssen fer at roynast vágbingum er óvist. Sáttmálastovnurin hevur góðkent projektið (460 miljónir) og út frá hesum hava undanfarna landsstýrið og fíggjarnevnd veitt projektinum sømdir fyri reiðiliga 100 miljónir tilsamans.

Danski skipskredittgrunnurin skal fíggja 80 % av byggingini, og seinast vit vistu hevði grunnurin biðið um persónligar upplýsingar um svian.

MEIRA Í MORGIN

Hesar upplýsingar hevur grunnurin fingið og umsóknin kemur til viðgerðar fyrst í februar.

Niklas Magnussen, ráðgevi og meðeigari í skipasmiðjuni í Vági, sigur, at hesir upplýsingar um Jonsson eru spildurnýggir fyri hann.

Til blaðið í morgin fara vit at rioyna at fáa orð á Jóhan Dahl, stjóra á skipasmiðjuni í Vági, Rolf Jonsson, og kanska onnur við, fyri at vita, hvussu væl projektið er tryggjað ímóti møguligum spekulatións-motivum.

ówh

lesarabrøv

Hjúnaband

Harra blaðstjóri!

Eg havi við áhuga lisið greinina um rættin at draga rentuútreiðslur av bústaðarlánum frá áðrenn skatting (Sos. 29. jan.).

Sambúgvandi kunnu draga 120.000 krónur av rentuútreiðslunum frá, støk bert 60.000 krónur. Í greinini verður m.a. víst á, at uppskotið fer at fáa sambúgvandi at himprast við at fara hvør til sítt, hóast tað hevði verið best fyri allar partar. Tann, sum situr eftir við húsunum, fer tá bert at kunna draga 60.000 krónur frá, har tey frammanundan og saman kundu draga 120.000 krónur av rentuútreiðslunum til húsini frá.

Tað er mikið gott, at víst verður á hetta. Eg vil bert leggja afturat, at tað snýr seg ikki bert um figgjarstøðuna hjá teimum vaksnu sum so: tað snýr seg um møguleikan hjá tí, sum eftir situr, at breyðføða børnini.

Til tess verður ikki bara ein forsyrgjari minni: omaná hetta fær tann, sum situr eftir við húsum og børnum, eina nógv tyngri húsaútreiðslu.

RF

ÚTSØLAN byrjar mikumorgunin 30/1-91 kl. 8.30

Højgaards Handilsvirki

Deild C · Runavík · Tlf. 47276-47976

sosialurin

— altíð fyrstur við tí síðsta!



Gerist haldarar **NÚ** — og fáið alt hetta:

Einsamøll — eingi tíðindi

— 5 bløð um vikuna í 3 mánaðir fyri bert **195,-**

Haldið so: tíðindablaðið **sosialin** og fáið henda góða vinin — Føroya mest lisna og mest endurgivna blað **5 ferðir um vikuna** fyri bert **½ søluprís!**

Haldið blaðið

- við teimum fjølbroyttu tíðindunum
- við besta trúvirðinum
- sum birtir upp undir skilagott og mennandi kjak
- sum er blað fólksins

tíðindablaðið sosialurin sjálvandi

- sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin -

Ja! Eg gerist haldari av Tíðindablaðnum Sosialinum og fái blaðið **5 ferðir um vikuna.**

Haldaragjaldið er kr. **195**,- fyri ársfj.
Haldarar uttanlands gjalda kr. **230**,-/ársfj.
Goldið verður ongantíð fyri fleiri bløð enn tey, ið eru eftir at koma í einum ársfjórðingi.

Navn: _____

Bústaður: _____

Bygd/býur: _____

Okeypis Sosialurin rindar postgjaldið

64

tíðindablaðið sosialurin

Box 76
110 Tórshavn

Kannað postverkinum